# Uppgávur til næmingin




Summardáar, Heine Hestoy

Bókadeild Føroya Lærarafelags 1995

Rannvá Hansen 2021

# Áðrenn tú lesur

Hygg at permuni. Hvør hevur skrivað skaldsøguna?

Hevur tú lisið nakað annað, sum rithøvundurin hevur skrivað? Um ja, hvat?

Hygg at permuni. Hvat heldur tú, at skaldsøgan man vera um?

Les tekstin á baksíðuni. Gitti tú nakað rætt, tá spurt var, hvat skaldsøgan er um?

© NÁM

## Um rithøvundin

Heine Hestoy er føddur á Tvøroyri í 1950 og vaks upp har. Heine var til sjós í nøkur ár, fór so á skúla í Marstal í Danmark og tók skipsføraraprógv. Síðan hevur hann búð í Danmark og siglt sum skipari.

Heine Hestoy hevur skrivað stuttsøgur, barna- og ungdómsbøkur og eitt hoyrispæl. Hann viðger ofta gerandisdagin, samspælið ímillum menniskjuni og arbeiðslívið.

Í 1991 fekk Heine Barnabókaheiðursløn Tórshavnar býráðs fyri bókina *Regin og Sára*.

Bókadeild Føroya Lærarafelags gav skaldsøguna *Summardáar* út í 1995.

Leita á netinum eftir upplýsingum um ymiskt, sum Heine Hestoy hevur skrivað. Ger ein stuttan samandrátt av tí, sum tú finnur.

## Meðan tú lesur

Tá ið tú lesur og kemur fram á orð, sum tú ikki kennir frammanundan, skal tú minnast til at skriva tey niður og skriva hvørjari síðu tey eru á.

| Orð | á síðu |
| --- | --- |
| | |
| | |
| | |
| | |
| | |
| | |
| | |
| | |
| | |
| | |
| | |
| | |
| | |
| | |
| | |
| | |
| | |
| | |
| | |
| | |
| | |
| | |

| Orð | á síðu |
| --- | --- |
| | |
| | |
| | |
| | |
| | |
| | |
| | |
| | |
| | |
| | |
| | |
| | |
| | |
| | |
| | |
| | |
| | |
| | |
| | |
| | |
| | |
| | |

## 1. Kapittul

Skriva eina hóskandi yvirskrift.

Greið frá hendingini við døgurðaborðið.

Lýs pápa Jóannes.

Lýs sambandið ímillum Jóannes og foreldrini.

## 2. Kapittul

Skriva eina hóskandi yvirskrift.

Lýs abban.

## 3. Kapittul

Skriva eina hóskandi yvirskrift.

Lýs Trygva.

© NÁM 

Lýs Marjuna.

Greið frá, hvussu Marjun og Jóannes hittast.

## 4. Kapittul

Skriva eina hóskandi yvirskrift.

Greið frá, hvussu rúsdrekka ávirkar atburðin hjá teimum ungu?

© NÁM

Hvat heldur tú um tað, at Marjun og Jóannes fara í song saman fyrstu ferð, tey hittast?

## 5. Kapittul

Skriva eina hóskandi yvirskrift.

Hvat hugsar Jóannes, tá ið hini práta um skúla og arbeiði?

Lýs Høgna.

## 6. Kapittul

Skriva eina hóskandi yvirskrift.

Greið frá kenslunum hjá Marjuni. Hví man hon hava tað soleiðis?

## 7. Kapittul

Skriva eina hóskandi yvirskrift.

Leita eftir hesum orðunum á sprotin.fo og skriva, hvat tey merkja.

Dekk

Messa

Dúrk ______________________________

Pøs ______________________________

Finn Nýfundland og greið frá, hvar tað er.

Sig eitt sindur um, hvussu Jóannes hevur tað, tá ið hann er komin umborð. Hvat sær hann, og hvat fær hann at vita?

Lýs teir, sum Jóannes hevur kahútt saman við.

| Rógvi | Ólavur | Helgi |
| --- | --- | --- |
| | | |

## 8. Kapittul

Skriva eina hóskandi yvirskrift.

Hvussu verður Høgni lýstur nú samanborið við tað, sum vit hoyrdu í 5. kapitli?

Greið frá ósemjuni ímillum Helga, Ólav og Jógvan.

## 9. Kapittul

Skriva eina hóskandi yvirskrift.

© NÁM

Hvussu hevur Marjun tað, eftir at Jóannes er farin avstað?

Skriva Jóannesi eitt bræv frá Marjuni.

Sig eitt sindur um, tá ið Marjun ringdi til Jóannes.

© NÁM

Hvussu hevur Jóannes tað, tá ið hann hevur tosað við Marjuna?

## 10. Kapittul

Skriva eina hóskandi yvirskrift.

Hvussu gongst Jóannesi í arbeiðinum?

© NÁM

Lýs kokkin.

## 11. Kapittul

Skriva eina hóskandi yvirskrift.

Greið frá óhappinum hjá Rógva, og hvussu tað ávirkar arbeiðið.

## 12. Kapittul

Skriva eina hóskandi yvirskrift.

Hví heldur tú, at skaldsøgan eitur *Summardáar*?

Greið frá sambandinum ímillum Marjuna og foreldrini.

Greið frá sambandinum ímillum Marjuna og Eirik.

## 13. Kapittul

Skriva eina hóskandi yvirskrift.

Greið frá teimum ymisku arbeiðsuppgávunum umborð, alt eftir hvat starv menninir hava.

## 14. Kapittul

Skriva eina hóskandi yvirskrift.

Greið frá óhappinum.

Sig eitt sindur um, hvat Jóannes hugsar, tá ið hann hevur tosað við Marjuna.

## 15. Kapittul

Skriva eina hóskandi yvirskrift.

Sig eitt sindur um, hvussu tað var hjá monnunum at koma til lands.

Hvat hoyra vit um brøv í hesum kapitlinum?

Skriva eitt bræv til Marjuna frá Jóannesi.

## 16. Kapittul

Skriva eina hóskandi yvirskrift.

Hvørja avgerð tekur Marjun í endanum á kapitlinum, og hví man hon gera tað?

## 17. Kapittul

Skriva eina hóskandi yvirskrift.

Sig eitt sindur um tíðina aftan á, at skiparin gav monnunum boðini um, at teir nú sigla heim.

© NÁM

Sig eitt sindur um, hvussu tað var hjá Jóannesi at koma heim.

## 18. Kapittul

Skriva eina hóskandi yvirskrift.

Sig eitt sindur um, hvussu var í dansinum.

## 19. Kapittul

Skriva eina hóskandi yvirskrift.

Hvørjar tankar hevur Jóannes, tá ið tað snýr seg um skúla og arbeiði?

## 20. Kapittul

Skriva eina hóskandi yvirskrift.

Greið frá óhappinum.

## 21. Kapittul

Skriva eina hóskandi yvirskrift.

Sig eitt sindur um, hvør fekk skaða, og hvønn skaða tey fingu.

Hví gekk so long tíð, áðrenn Marjun og Jóannes funnu saman aftur?

Hvat kunnu vit læra av tí, sum vit lesa um í hesum kapitlinum?

© NÁM

## Tá ið tú hevur lisið

Nær fer skaldsøgan fram? Grundgev.

Hvussu long tíð gongur frá søgan byrjar, til hon endar? Grundgev.

Lýs heimbygdina.

Hvørji evni verða viðgjørd?

Hvussu er málið í bókini? Er bókin løtt at lesa? Eru nógv trupul orð?

Hvør er boðskapurin?

Dámar tær bókina? Hví / hví ikki?

Skriva eitt bókaummæli.

Finn tað brotið í bókini, sum tær dámar best. Les tað upp fyri flokkinum. Sig frá, hví tær dámar júst hetta brotið.